# TILTØK

**Hóskvøldið 17. nov.**
***Sambýlið á Heygnum:*** kl. 19.30 Øssur Kjølbro

**Ungdómsgudstænasta Fríggjakvøldið 18. nov.**
***Glyvrar:*** kl. 20.00 Ungdómsgudstænasta, Meinhard Bjartalíð, ungdómskórið syngur.

**Gudstænastur**
*26. sunnudag eftir trinitatis*
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Bergur D. Joensen
***Havnar kirkja:*** Bjarni Bæk, altarg., skriftamál kl. 10.40
***Nólsoy:*** kl. 12.00 Sonja Klein
***Kirkjubøar kirkja:*** kl. 12.15, Bergur D. Joensen
***Sandavágur:*** kl. 12.00, Inga Poulsen Dam
***Saksun:*** kl. 11.00, Marjun Bæk
***Gøta:*** kl. 12.00 (altarg.,) Martin R. Jacobsen
***Selatrað:*** kl. 12.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Ritvík:*** *kl. 11.00, M*einhard Bjartalíð, altarg., (talvan gongur fyri einkjugrunnin).
***Kl. 17.00 Vesper*** (aftansangur), Kór Glyvra kirkju.
***Glyvrar:*** kl. 11.00, Lestur (talvan gongur fyri einkjugrunnin)
***Funningur:*** kl. 12.00 Messa, Emil Olsen
***Húsar:*** kl. 12.00 Niels Pauli Danielsen, altarg.
***Kirkjan á Kirkju:*** kl. 12.00,
***Hattarvíkar kirkja:*** kl. 17.00, Elsa Funding
***Vágur:*** kl. 11.00,
***Hvalba:*** kl. 12.30, Òlavur Rasmussen

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Ì dag kl. 17.00 Bøn fyri Føroyum og øðrum tjóðum.
Ì morgin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Bøn fyri býnum og Ìsrael, kl. 19.00 Delli.
Hósdagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 16.00 Bøn fyri samkomuni, kl. 19.00 Chil.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Flare.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Alex O'Campo, kl. 11.50 Sunnudagsskúlin
www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Møti, sjónvarpsupptøka, kl. 11.30 steðgur við drekka.
À tilbiðjanarmøtinum kl. 12.00 heldur Jógvan Z. fram við røðini: Sannleikar úr Rómbrævinum »Rættvísgjørd fyri einki av náði Hansara« (3:21-31). Barnaansing er undir møtinum.
Sunnudagsskúlin kl. 12.00.
Møti kann hoyrast á netinum www.livdin.fo
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.

**Landsbókasavnið Tórshavn**
Týskvøldið kl. 20.00 Ein tíma við Bíbliuni. Øll eru vælkomin, Terje Gravningen og Erik Lund.

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Hannu Davidsen og Bodil Simonsen.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 After Eight.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Jógvan Lamhauge.
Mánadagin kl. 14.30 til 15.30 venur barnakórið, aldur 1. flokkur og eldri.
Kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15.00 Bøn.
Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið, vitjan av Jónvør Christiansen.
Fríggjadagin kl. 20.30 Tey ungu samlast.
Sunnudag kl. 11.00 Møti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti við m.a. »Minns du sången« á stórskíggja.

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarfundur, Páll Poulsen talar. Evnið: »Hin sjónliga og hin ósjónliga samkoman«. www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, Matt. evangl. kap. 5, v.1-20.
Mikukvøldið kl. 19.00 Meinigheitskórið venur.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Sverra Steinhólm. Tensingkórið syngur.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 MiniSalt.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar, kl. 18.00 Evangel. møti við Elin og Hans Tausen. www.gospel.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin 15. nov. kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børnini.
Týsdagin 15. nov. kl. 19.30 í KFUK: Bíblilubólkurin.
Týsdagin 15. nov. kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga Sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.
Mikudagin 16. nov. kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið møtir. Ung frá 13 ár og upp eftir eru vælkomin við.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Ytrimissiónsfundur í Vestmanna**
Týsdagin 15. nov. kl 19.30: Almennur ytrimissiónsfundur við Ruth-Inge Gregersen, landsskrivara í Danmissión. Drekkamunnur aftaná.

**Sandavágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum hóskvøldið 17. nov. kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Filadelfia Vágar,**
*Miðvágur*
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Miðvágs missiónshús**
Kvinnumøti verður mikukvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið Libanon**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 17. november kl. 20.00. Burturluting verður fyri lyftu til Sjómansheimið í Reykajvík. Mint verður á jólapakkarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti hjá Kristu og Fríðbjørn Poulsen.
Mikukvøldið kl. 20.00 Ungdómsarbeiði.
Hóskvøldið kl. 19.00 Barnaarbeiði.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting.

**Hvalvíkar missiónshús**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, Matt. evangel. kap. 5. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikudagin kl. 17.30 Tim5.
Kl. 20.00 Húsmøti hjá Hargar og Mariannu í Æðuvík.
Kl. 19.30 Kvøldbíbliuskúlin.
Hósdagin kl. 17.00 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Pola Jacobsen, kl. 11.30 Sunnudagsskúli.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Toftir**
Y. M. Barnaringurin skipar fyri jólastovu í missiónshúsinum leygardagin 19. nov. kl. 15.00. Tom Skaale greiðir frá arbeiðinum Úkraine. Børnini luttaka við sangi. Søla og burturlutan verður til frama fyri ytrimissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin. Sí annars gulu síðurnar.

**Keldan, Skálafirði**
Leygardagin kl. 21.00 Awake við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11.00. Vælkomin í Kelduna.

**Missiónshúsið í Ritvík**
Sudanringurin kemur saman týskvøldið 15. nov. kl. 19.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Fuglafirði mikukvøldið kl. 19.30. Richard Danielsen talar. Evnið: Samkoman - eitt høgt kall. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bønhúsið á Hellunum**
Missiónsvirkan byrjar mikukvøldið 16. nov. kl. 20.00, Regin Høgnesen talar, Jónhilda og Gullak syngja.
Hóskvøldið kl. 20.00 Knút Larsen talar, Húsakórið úr Leirvík syngur.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Jógvan Fríðriksson talar, Hannis syngur.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Sigfred Johannesen talar. Menn av Strondum syngja.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Niels Jacob Nielsen talar. Innsavnan til Heimamissiónina.

**Missiónsvikan í KFUM & K, Klaksvík**
Týsdagin kl. 20.00 Bønarmøti, Ung syngja.
Mikudagin kl. 19.30 Møti, Ingolf Jóhannessen talar.
Streingjakórið í KFUM & K syngur.
**Barnaansing fyri børn undir skúlaaldri.**
**Bønarløta er hvørt kvøld 1/2 tíma áðrenn møtið byrjar.**
**Frá mikukvøldinum verður boðið til kaffi aftaná møti. Boðið verður til samtalu og/ella forbøn. Ynskja tygum bil til møtini, eru tit vælkomin at ringja 457425.**

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Hendrik Olsen.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Týskvøldið kl. 19.30 Bíbiltími við André Matras. Evni: Tungutala.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti við Deboru Bringsberg og André Matras og ung vitna.
Leygarmorgun kl. 10.00 Bøn og kl. 21.00 Ungdómsróp.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Mánadag til fríggjadag kl. 6.15 er Morgunbøn. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Missiónsvikan verður frá 17. til 20. nov. Fremmandir talarar. Ymiskar sangkreftir. Hjartaliga vælkomin.
*Stýrið*

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími 2. Kor. 7. kap.
Hóskvøldið kl. 20.00 Kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mikudagin 16. nov. kl. 18.00: Junior-møti, kl. 20.00: Heimaforbundið.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Eyðun Christiansen talar.

**Missiónshúsið í Vági**
Missiónsvikan byrjar týskvøldið kl. 20.00 og heldur fram vikuna út. Verið hjartaliga vælkomin.

**Örkin, Reykjavík**
Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari vitjar Örkina 2.-5. des. Ì hesum sambandi verður hugnaløta leygarkvøldið 3. des. kl. 20.30 og møti sunnukvøldið 4. des. kl. 20.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 14. nov.*
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45: Enskt á byrjunarstigi 1, Hilda Frýdal
kl. 14.00-17.00: Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart o.o. spøl.
**Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan mikudag og fríggjadag. Tilmelding mánadag á tlf. 316491.**
*Týsdagin 15. nov.*
kl. 10.00-11.30: Vit synga, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
**Tilhaldið verður stongt kl. 12.00 vegna valfundin.**
**kl. 15.00: Tilhaldið skipar fyri valfundi til eldraráðið í Tórshavnar kommunu í útvarpshøllini.**
**Valevnini luttaka.**
*Mikudagin 16. nov.*
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 10.00-17.00: Vit fyrireika jólasluna
*Hósdagin 17. nov.*
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45: Enskt á byrjunarstigi 2, Àsmundur Johannesen
kl. 14.00-17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00-16.00: Boccia í Kjallaranum, Alma Poulsen
*Fríggjadagin 18. nov.*
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 10.00-12.00: Máling og tekning, Vegleiðing á staðnum
kl. 13.00-17.00: Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn, eftirmeting**
Mikukvøldið 16. november kl. 19.00 verður vitjað á Tryggingarfelagnum Føroyar á Kongabrúnni. Aftaná verður eftirmeting av gonguárinum. tilmelding neyðug.

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl
***Mikudag***
Vit gera jólaprýði
***Hósdag***
Fimleikur
Hvønn dag drekka við nýbakaðum.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðuni til taks.
Mánadagin14. nov.: Palli Dalsgaard lesur »Duld eru døpur mein«, søgnin um jarðarmóðurstykkið í Skálavík.
Mikudagin 16. nov.: Boccia í kjallaranum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagur 14 nov.
Fimleikur.
Týsdagur15. nov. Prát og sangur. Vit spæla landastrok.
Mikudagur 16. nov. Kl. 9.45. Matgerð v. Varnu av Rana. Kl. 12. Døgurði. Til ber at koma til døgurða sum gestur. Tekning innan týsdagin á middegi á tlf.448518 ella 222922. Kl.15. Opið sum vanligt. Kl. 16. Boccia.
Hósdagur17. nov. Myndaskering v. Hjalmar Olsen.
Fríggjadagur 18. nov. Byrjandi enskt v. Annette Gaardlykke.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið á Toftum**
*tlf. 448690*
*er opið frá mánadag-fríggjadag, kl 14.00-18.00.*
Mánadagin 14. nov. fimleikur frá 15.00-1600 v) Jóhonnu Petersen. Mynda útskering frá 16.00-17.00 v/ Hjalmar við Rætt.
Týsdagin 15. nov. Teldu-skeiðið heldur fram, Tilhaldið er opið sum vant.
Mikudagin 16. nov. vit syngja frá kl, 15.00-16.00. Martin Restorff Jacobsen.
Hósdagin 17. nov. ættaprát frá kl. 15.00-17.00. Jákup M. Mikkelsen, Sørin Jóhanesen og Jústines Hansen.
Fríggjadagin 18. nov. BOCCIA, Harry Hansen.
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið á Toftum.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.